Bjørg Hentze

Fra: gr@mark.fo
Sendt: hósdagur, 5. februar 2026 13:07
Til: Bjørg Hentze; Heri Petersen; Almanna- og heilsumálaráðið
Emne: Viðmerkingar SV: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um leigustuðul

Hey tit.

Viðmerkingar til: Uppskot til løgtingslóg um leigustuðul

Tað er sera jaligt, at arbeitt verður við at betra um treytirnar hjá leigarum við leigustuðli. Tó er tað týdningarmikið, at stuðulin verður veittur til leigarar sum leiga bústaðir, sum í veruleikanum eru bygdar og góðkendar til varandi bústað.

Eftir okkara tykki eigur leigustuðul einans at verða veittur til sjálvstøðugar íbúðir, sum í minsta lagi hava:
• egið wc við brúsu
• egnan køk
• egna inngongd
• nøktandi parkeringsviðurskiftir
• nøktandi brunatrygd, herundir roykalarm, sløkkiútgerð v.m.

Endamálið eigur at vera, at tryggja at almennir pengar stuðla leigarum í bústøðum, sum eru bygdir til endamálið, tryggir og heilsuliga forsvarliga at búgva í. Tí eigur leigustuðul ikki at verða veittur til fyribils ella óhóskandi bústaðarloysnir, so sum kjallaraíbúðir, kømur, neyst v.m. í gomlum bygningum, har brunatrygd og bústaðarstandardur ikki lúka nútímans krøv. Avmarkingin omanfyri fer at økja um trivnaðin og trygdina hjá búfólki. Eisini ferð avmarkingin at tryggja, at bústaðarstuðulin verður latin samsvarandi endamálinum við lógini og tí sum okkara grannalond lata hana eftir.

At enda vilja vit vísa á, at leigustuðul eigur bert at verða givini til leigarar, sum búgva í bústøðum, har eingin stuðul er latin til bústaðin frammanundan. Hetta fyri ikki at skeikla kappingina og fyri at fáa symetri í lóggávuna.

Vh.
MARK
Gordon Rajani, stjóri
www.MARK.fo
tel. 290080

Fra: gr@mark.fo <gr@mark.fo>
Sendt: 5. februar 2026 11:48
Til: 'martin@nordbil.fo' <martin@nordbil.fo>
Emne: VS: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um leigustuðul

---

Fra: Rannvá <mark@mark.fo>
Sendt: 21. januar 2026 00:29
Til: Gordon Rajani <gr@mark.fo>
Emne: Fwd: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um leigustuðul

Vh/Rannvá

Start på videresendt besked:

Fra: Bjørg Hentze <bjorg@ahr.fo>
Dato: 15. januar 2026 kl. 15.44.33 WET
Til: Heri Petersen <Heri@ahr.fo>
Emne: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um leigustuðul

Til hoyringarpartarnar:
Almannaverkið, Vinnuhúsið, MEGD, Brekumboðið, Bústaðir, MARK, Fakfelagssamstarvið, Samtak, Samverk, Sosialráðgevarafelag Føroya, Kommunufelagið, Fíggjarmálaráðið, Tilfeingis- og vinnumálaráðið, Landsbankin, LÍV, Betri Pensjón, Áhugafelagið Lutaíbúðir, Landsfelag pensjonista

Góðan dag,

Hjáknýtt er uppskot til løgtingslóg um leigustuðul, sent tykkum til ummælis.

Ummælisfreistin er mánadagin **9. februar kl. 12.00**

Møgulig hoyringarsvar skulu sendast til Almanna- og heilsumálaráðið, teldupostur: ahr@ahr.fo við cc. til heri@ahr.fo.

Vinarliga / Kind regards

Bjørg Hentze
Samskipari / Coordinator

Office: +298 30 40 50
Mobile: +298 73 40 03
bjorg@hmr.fo

Almanna- og heilsumálaráðið
Undir Bryggjubakka 27
FO-100 Tórshavn

+298 30 40 50
www.ahr.fo